Jacob Vestergaard
Árni Skaale
Beinir Johannesen
Bárður á Lakjuni
Jørgen Niclasen
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 100/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina (Víðkaðar heimildir at áseta reglur um avmarkandi tiltøk)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Tiltøk, sum kunnu ávirka fiskivinnuavtalur við onnur lond, ella sum avmarka útflutning av fiskavørum og matvørum, kunna ikki setast í verk uttan við heimild í serstakari løgtingslóg. Tó kann landsstýrismaðurin avmarka virksemi hjá russiskum fiskiskipum at fara fram í ávísum havnum í Føroyum."

Viðmerkingar:
Ásetingin í stk. 2 verður broytt nakað. Við uppskotnu orðing verður landsstýrismanninum heimilað at avmarka virksemi hjá russiskum fiskiskipum at fara fram í ávísum havnum í Føroyum, uttan at hava heimild í serstakari løgtingslóg. Hetta merkir t.d. ikki, at landsstýrismaðurin kann avmarka virksemi til bert at umfata nakrar ávísar tænastur ella annað. Tá er neyðugt við heimild í serstakari løgtingslóg sbrt. § 1, stk. 2, 1. pkt.

Á Løgtingi, 16. juni 2023

Jacob Vestergaard — Árni Skaale

Beinir Johannesen — Bárður á Lakjuni

Jørgen Niclasen